Vegleiðing til uppsetan av Fritz!Box 7581

Hendan vegleiðingin er bert galdandi um routarin ikki er keyptu beinleiðis frá Føroya Tele

Tøppa inn ‘**192.168.178.1’** á kagarinum



Loyniorðið til routaran og tær tráðleysu upplýsingarnir finnur tú á einum lepa aftanfyri á routaranum.

Um beinarin av onkrari orsøk gevur tær ein **Setup Wizard** skalt tú velja **Annex A** og trýsta á *next*. Trýst síðani á *Cancel* og *Exit Wizard* fyri at koma út úr Setup Wizard.



Trýst á teir 3 prikkarnir ovast í høgra horni

Flyt knøttin í ***Advanced View*** so hann verður grønur - hetta gevur tær fleiri møguleikar at broyta innstillingar.



Trýst síðani á **Internet -> Account Information -> Internet Connection**

- Vel ***Other Internet Service Provider*** og skriva 'Faroese Telecom - VDSL'
- Rulla oman til ***Account Information*** og vel **No**



Rulla oman til ***Connection Settings***

- Trýst á ***Change connection settings***
- Skriva *1* í **VPI** og *47* í **VCI** sum víst niðanfyri
- Trýst á **Apply**



Tá ið tú hevur trýst á **Apply** skalt tú goyma uppsetanina og hon verður síðani kanna. Trýst á **OK** tá ið kanningin er liðug fyri at testa internet uppsetanina.



Tá ið hendan myndin kemur fram hevur tú samband við internetið. Um tú fært ein feil kann tað verða neyðugt at endurstarta beinaran.